# Forhúðstronga
## Vegleiðing um skurðviðgerð

**Skurðviðgerðin**

Tit skula møta á Barnadeildini um morgunin kl 7.30 fastandi. Fyribyrgjandi verður givin pínustillandi heilivágur. Skurðviðgerðin fer fram í fullari doyving. Undir skurðviðgerðini verður tann parturin av forhúðini, har sjálvur trongin er, tikin burtur. Pentur verða settar í, sum hvørva av sær sjálvum eftir nøkrum vikum.

Bert annað av foreldrunum kann verða hjá soninum meðan hann verður lagdur at sova men aftaná skurðviðgerðina kunna bæði foreldur verða saman við honum á viðrakningsstovuni.

**Eftir skurðviðgerðina**

Tá sonur tykkara kemur aftur á Barnadeildina fær hann at eta og drekka. Eftir nøkrum tímum, og tá hann hevur pissað, kunna tit útskrivast.

Teir fyrstu dagarnar kann tað svíða eitt sindur, serliga tá hann pissar.
Tit fáa lokaldoyvandi krem at smyrja á nakrar ferðir um dagin. Sum pínustillandi kann gevast Panodil. Best er, um hann fær Panodil fast tann fyrsta dagin, tvs. fimta-sætta hvønn tíma. Pínan minkar yvir 1-2 dagar.

Tað er ikki óvanligt, at tað hovnar um sárið. Sum fyribyrgjandi kann penis vendast uppeftir við at leggja skúmlappar undir pungin.

**Hald sárið reint.**

Sonur tykkara kann fara í brúsubað dagin eftir skurðviðgerðina, men vit mæla frá karbað og svimjing teir fyrstu 7-10 dagarnar. Vit ráða til leys klæðir so sum joggingbuksir.
Eru tekin til bruna í sárinum (reytt, spent, heitt, fepur) vendið tykkum so til kommunulæknan.

Landssjúkrahúsið
Skurð Ambulatorium